## Munch setti met

Verk hjá norska listamálaranum Edvard Munch gerast altsamt betur og betur umtókt, og tað kom eisini til sjóndar á einum uppboði hjá teirri kendu uppboðssøluni Sotheby's í New York mikudagin. Verk hjá Edvard Munch eru ikki vanlig á almennum uppboðum, men hesaferð var málningurin "Genturnar á brúnni" á sølulistanum. Hann fór fyri milliónir krónur, og tað er næstan tríggjar ferðir tað, sum málningurin varð seldur fyri seinast.



*Málningurin "Genturnar á brúnni", sum Edvard Munch málaði (Mynd: Vísir)*

## Keyptu smugl frá russum

Løgreglan í íslendsku bygdini Húsavík legði í gjárkvøldið hald á brennivín og sigarettir, sum fólk høvdu keypt umborð á einum russiskum trolara, sum liggur við bryggjuna har. Talan var um tíggju litrar av vodka og átta kartengur av sigarettum. Tað tók løgreglan, og keypararnir fáa bót. Fyri tveimum árum síðani var hesin sami trolarin í Íslandi, og tá legði løgreglan hald á løgreglan 40 litrar av brennivíni og 1.400 kartengur av sigarettum.

# Hollendingur skrivar høvuðs-uppgávu um Føroyar

**Felix van den Gein hevur valt føroyskan politikk og ríkisrættarligu støðuna millum Føroyar og Danmark, sum evni til sína høvuðsuppgávu**

FERÐAMAÐUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

- Føroyar eru lítið kendar í Hollandi, men eg var á vitjan her í 2006 og bleiv longu hugtikin av oyggjunum tá. Tað var undir einum túri í Skottlandi og Hetlandi, at áhugi mín fyri Føroyum varð vaktur.

Tann 23 ára gamli lesandi úr Hollandi, Felix van den Gein, er sum flestu landsmenn hansara ógvuliga fryntligur at práta við. Felix lesur við Lærda Háskúlan í Utrecht í Hollandi. Sjálvur er hann úr býnum, Waalwijk. Høvuðsfakið hjá Felixi er Social Antropologi. Útbúgvingin er skipað á tann hátt, at fyrst tekur hann trý ár bachelor og síðani tvey ár master. Við útbúgvingarenda gera tey lesandi eina høvuðsuppgávu. Tey fáa fýra mánaðir til at gera høvuðsuppgávuna.

### Føroyskan politikk

- Tey flestu velja ta løttu loysnina og skriva eina høvuðsuppgávu úr Hollandi. Men eg fyri mín part vildi gera okkurt nýtt og slóðbrótandi. Føroyar hava havt mín stóra áhuga, síðani eg var her á fyrsta sinni í 2006, og tí havi eg valt at gera eina høvuðsuppgávu um føroyskan politikk, og ta ríkisrættarligu støðuna millum Føroyar og Danmark.

Holland er eisini eitt kongaríki, og eins og Danmark, so hevur Holland eisini atlond, sum hoyra til hollendska kongaríkið, hvørs borgarar hava hollendskan ríkisborgararætt, eins og føroyingar og grønlendingar hava danskan ríkisborgararætt. Hesi atlond fáa eisini eina ríkisveiting úr Hollandi, eins og Føroyar og Grønland fáa eina ríkisveiting úr Danmark. Aruba og Niðurlendsku Antilurnar liggja í karabiska havinum og hava eisini eitt stýrislag, sum minnir nógv um heimastýrislógina.

### Hitt allar partar

Felix hevur uppsøkt fólk úr øllum flokkum úr øllum Føroyum, og í ymiskum aldri. Hann hevur havt samrøður við yvir 30 fólk. Hesar samrøður koma at spæla ein avgerandi leiklut í høvuðsuppgávuni, sum Felix skal verja yvir nøkrum opponentum á Lærda Háskúlanum í Utrecht. Hetta fer so at henda seinni í ár. Felix hevur møtt fólkum í Føroyum, sum eru ógvuliga ójavn á máli um tann ríkisrættarliga spurningin. Hann hevur bitið merki í, at t.d. í Javnaðarflokkinum og í Fólkaflokkinum er rættiliga vítt spenni millum sjónarmiðini innanfloks, tá tað kemur til tann ríkisrættarliga spurningin. Men Felix hevur eisini lagt dent á at gera samrøður við vanlig fólk, tað eru ikki bara politikkarnir, sum koma til orðanna í høvuðsuppgávuni.

### Er eisini myndamaður

Høvuðsuppgávan er sjálvandi aðalorsøkin til, at Felix er komin til Føroya, men hann er eisini ein ógvuliga dugnaligur og íðin myndamaður. Hann hevur tikið túsundtals myndir úr Føroyum, og fleiri av teimum bestu hann hevur tikið, eru at finna á heimasíðuni *www.flickr/photos/felixgein*. Har sæst, at Felix hevur bitið merki í lutir, sum vit, sum hava heima í Føroyum so mangan yvirsíggja. Ein og hvør, sum er áhugaður í myndum, eigur at fara inn á heimasíðuna.

- Tað er spennandi at verða myndamaður í Føroyum. Her eru so nógv góð motiv, og so er tað hetta spennandi og umskiftiliga ljósið tit hava her.

Felix letur ongan iva verða um, at áhugin fyri at taka myndir, eisini var eitt gott alibi at koma til Føroyar.

### Møguleikar

Felix sær góðar møguleikar í at fáa hollendingar til Føroyar at ferðast. Hollendingar ferðast nógv í t.d. Skottlandi og Írlandi, tí teimum dámar so væl fríu og vøkru náttúruna. Hann heldur, at vakra landslagið, villa náttúran og tann ótrúliga fríska luftin, er nakað sum hevði hóvað nógvum hollendingum. Men høvuðstrupuleikin er sjálvandi, at alt ov fá kenna nakað til Føroyar í Hollandi. Sjálvt lærarnir við Lærda Háskúlan í Utrecht stóðu spyrjandi, tá Felix segði, at hann fór at skriva høvuðsuppgávu um Føroyar. Felix heldur tað kundi verið eitt gott uppskot, at umboð fyri føroysku ferðavinnuna møttu upp til onkra ferðavinnumessu í Hollandi fyri at marknaðarføra Føroyar. Unnustan hjá Felixi tekur eina útbúgving innan ferðavinnuna, og er Felix spentur uppá hvat unnustan fer at siga um Føroyar, sum ferðamannaland.

### Fótbólturin

Hóast tað ikki gongur ov væl hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, so undirstrikar Felix, sum so mangur annar fremmandamaður, at tey flestu, sum hava hoyrt um, ella kenna til Føroyar, eru fólk, sum eru áhugað í fótbólti. Sjálvur er Felix ein íðin RKC Waalwijk-viðhaldsmaður, og hevur hann havt sesongkort í fleiri kappingarár, og er hann enntá farin til fleiri útidystir. RKC hevur spælt í næstbestu fótbóltsdeildini í ár, men nú í næstum skulu teir leika tveir upp- og niðurflytingardystir ímóti ADO den Haaq, um rættin at sleppa at spæla í Heiðursdeildini, sum hollendingar nevna fremstu fótbóltsdeildina. Felix veit eisini, sum aðrir fótbóltsáhugaðir hollendingar eg havi møtt, at føroyski landsliðsleikarin, Súni Olsen hevur spælt við FC Zwolle í Hollandi.

Felix hevur ikki verið til nakran landsdyst hjá hollendska landsliðnum enn, men koma Føroyar og Holland í bólk saman, er hann púra ivaleysur í, at hann fer til dystin.



*Felix van den Gein lesur antropologi í Hollandi og hevur valt sær føroyskan politikk og ríkisrættarligu støðuna sum høvuðsuppgávu*

Mynd: Jens Kristian Vang